# Tjóðveldi skotið Føroyar í fótin

PETUR KLEIN

**Tyst som i graven**

Tað er framvegis ongin greið ábending um hvørt Sandoyartunnilin, lívsprojektið hjá teimum báðum Knold og Tot, skal borast. Hinvegin, so eru dagligar ábendingar um, at heilsuverkið er í neyð. Har vantar fólk, leiðsla og pengar. Fyri líkasum at halda fast í ábendingum, so eru tær meira diffusar, tá talan er um skúlar og útbúgving, altso tær sum liggja uttan fyri Havnina.

Hvør var avleiðingin, um stjórin í vinnuhúsinum bleiv landsstýriskvinna í vinnumálum. Hon var jú fyrsta val til umleið kl. 17.15 tann famøsa dagin. Er ikki hugsandi, at hon segði "cut Elly" um Sandoyartunnilin og heldur setti meira av til flogvøllin í Vágum, so hann kundi gerast 1800 metrar, heldur enn 1600? Hetta hevði so endaliga punkterað utopisk projekt um alternativan flogvøll. Tað er meir enn so møguligt, at vit kunnu siga tað var spell, at hon takkaði nei. Samansetingin hevði ikki veri stórt ørvísi. Sitandi lanstýriskvinna í vinnumálum sat so bara í mentamálaráðnum.

Ábending? Jú, síðan røðuna hjá Olgu Biskopstø á Sandi 12/03 er ábendingin um, at tunnilin verður boraður, enn greiðari. Tað vil siga, at heilsuverkið framvegis skal koyrast upp á "crash based maintenance".

Ábendingar; ongar greiðar linjur um hvat vit vilja, men tað sum liggur í luftini er, at alt avhongur av Sandoyartunnlinum.

**Almanna- og Heilsumálaráðið tað sama sum Landssjúkrahúsið?**

Tað skulu helst serfrøðingar úr útlondum til at skilja Landssjúkrahúsið frá Almanna- og Heilsumálaráðnum, men hevði tað ikki verið betur, um AHR kanska var í Runavík? Landsins politikkarar eru helst allir á einum máli um, at nærum ein og hvør vinna kann, ella skal kunna, vera á Svínoy, Sandoy ella Suðuroy. Altso, tað SKAL vera útjaðaranum lív lagað. Um so er, ber tað so ikki til hjá einum stovni sum AHR at liggja uttan fyri Havnina? Altso millum Havnina og útjaðaran. Runavíkar kommuna selur sikkurt gleðiliga stykki at byggja á. Øki sum Runavík, Vágoyggin og Klaksvík liggja millum Havnina og útjaðaran. Er tað ikki eitt stórt pluss fyri útjaðaran, at stovnar koma út í tómrúmið millum Havnina og útjaðaran at liggja? Eitt slag við pískinum, so var SSL flutt, so tað ber til.

Er tað nakar sum veit, hvørjar sergreinar vit hava grundarlag fyri í sjúkrahúsverkinum?

Tað er romantikkur, at allar sergreinir skulu hava sína deild í Føroyum, vit hava slett ikki grundarlag fyri tí. Spurningurin er, um tað ikki er vitleyst við fleiri av teimum. Tænastan er nógv betur fyri fleiri av teimum, um brúka vit og skil og fara har serkunnleikin er stórstur. Møguleikarnir fyri at menna alt heilsuverkið vera fleiri ferðir betur, um vit steðga allari víðari útbygging á LS og heldur brúka orku upp á at menna tað, sum er realistiskt fyri okkum at hava. Men hendir tað? Nei, men tað hevur sjálvandi onki við centralisering at gera. Arbeiðssetningurin hjá LS er ikki tann sami sum hjá Vatikaninum, men annars líkist.

Tær greiðastu ábendingarnar eru, at LS arbeiður við fullari kraft fyri at fáa alt at liggja á einum stað. Læknavaktin er eitt dømi. Tað at tú skalt til Havnar, um tú hevur brúk fyri læknahjálp millum 16 og 08. Er tað ikki vandamikið fyri patient, aðrar trafikkantar og so eisini føraran sjálvan? Men kanst tú ikki tað, so senda vit ein sjúkrabil úr Havn, tað tekur sikkurt framvegis bara handan famøsa tíman til Havnar. Annan vegin. Samstundis sum tað er ein stórur samfelags trupulleiki, at tað tekur hálvan tíma og ikki 20 minuttir úr Skopun til Havnar. Samanhang? Heldur ikki har. Vaskaríið koyrir upp á pumpurnar, ongin peningur til viðlíkahald. Hví er tað nú, at vit bara hava eitt vaskarí?

Tað sum so er enn meir óhugnaligt er, at allir politiskir flokkar eru við upp á tað, sum LS er í ferð við, tað passar teimum sikkurt eisini væl, at man, tá tað einaferð gongur galið, kann siga at LS situr við Svarta Peri. Men LS hevur góðar treytir, tað er ongin politikkari, sum hevur áhuga í økinum sum liggur millum Havnina og útjaðaran, hetta hóast næstan 2/3 av Føroya fólkið býr her.

Tað einasta sum hendir nú er, at vaksnir menn berjast um tunnlar.

Tjóðveldi sigur, at samfelagið skal vera fyri øll, nevna eisini samhaldsfesti og skynsemi. Tað er ikki tað, vit síggja við verandi samgongu. Hetta gongur alt út upp á at tryggja sær Sandoyartunnilin. Var tað ikki tað, so var Sjálvstýrisflokkurin helst partur av samgonguni. Tjóðveldi hevur ein næstformann, sum sigur Páll vera fólkafloksmann. Hetta veit Páll, men hví reagerar hann ikki upp á tað? Helst tí at tunnilin "er i hus", við hjálp av onkrum øðrum tunnli, so nú letur Páll nógv um seg ganga. Kanska hann kann brúka hitt seinni, men nú er tað tunnilin, fyri ein hvønn prís.

**Hví roknar roknar tú altíð við, at viðuskiftini betrast eftir val?**

Teir politikkarar, sum ikki hava Havnina/sentraliserning sum einasta áhugamál, eru teir, sum eftir næsta val heldur vilja sita á onkrum smáplássi og skriva endurminningar. Tað verður ikki betur, men hvussu kann tað tað, tá tað eru 28 kamelíónir á tingið?

Tey vit hava sett á ting, ganga ikki upp á kompromis, tey slúka heldur ikki kamelar. Tey selja og keypa ross.

---

# Hugleiðingarnar hjá Hans Paula Strøm um viðurskiftini á sjúkrahúsunum

SONJA NIELSEN,
NÆSTFORKVINNA
Felagið Føroyskir
Sjúkraróktarfrøðingar

**Grein í Sosialinum 09.04.08**

Í samband við fíggjarlógina fyri 2008 hevur landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum nakrar hugleiðingar um viðurskiftini á sjúkrahúsunum. Hesar hugleiðingar eru ov eintáttaðar og kunnu ikki standa uttan viðmerking.

Hans Pauli Strøm grundgevur fyri meirnýtsluna á sjúkrahúsverkinum. Hann sigur m.a., at avloysarar hava kostað 4,2 mió., tí at tað hevur verið trupult at manna serstøku førleikakrevjandi størvini innan sjúkrarøkt á intensiva og neonatala økinum. Her vanta spurningar t.d, hví tað mangla førleikar á hesum økjum júst nú. Kann vánaligur trivnaður, ov stórt arbeiðstrýst, umlegginar av deildum o.t. vera orsøkin?

**Meirnýtslan á Landssjúkrahúsinum**

Eisini sigur Hans Pauli Strøm, at eyka útreiðslur hava verið av øktari sjúkufráveru, og hetta stavar frá tí ágangi og negativu umrøðu, ið Landssjúkrahúsið hevur verið fyri. Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum eigur at minnast, at negativa umrøðan kom av, at sjúklingurin ikki fekk ta viðgerð og røkt, hann hevði krav á. Hetta var vegna ov stórt arbeiðstrýst, har starvsfólkið ikki náddi allar uppgávur, hóast tey stríddust meira enn rímiligt er. Eg meti ikki, at sjúkufráveran er orsakað av negativu umrøðuni, men hinvegin ein avleiðing av, at krøvini til starvsfólkið eru órímiliga høg, og tí vil strongd verða høvuðsorsøkin fyri sjúkufráveru. Tað er almenn vitan innan nútímans leiðslu, at sjúkufrávera er eitt høvuðsbarometur fyri, hvussu eitt arbeiðpláss virkar, og hvussu starvsfólkini trívast. Vit noyðast at kalla ein spaka fyri ein spaka og viðurkenna sjúkufráveruna fyri tað, hon er, nemliga at tað illa ber til at vinda meira úr starvsfólkunum, sum virka undir alt ov hørðum trýsti.

Hans Pauli Strøm hugleiðir um avleiðingarnar av, um politisku myndugleikarnir ikki fara at viðurkenna kostnaðin av sjúkrahúsverkinum. Her má tann politiski myndugleikin hava dirvi til at peika á, hvørjar funktiónir skulu burtur, um peningur ikki verður játtaður. Skal tað verða krabbameinsviðgerð, seingjardeildir, psykiatriska økið ella okkurt heilt annað, vit skulu vera fyriuttan? Við avmarkaðari játtan fæst eisini avmarkað viðgerð og røkt.

**Framtíðar heilsuverk**

Hans Pauli Strøm nýtir "Álitið um framtíðar heilsuverk" sum loysnina fyri allar trupulleikar, sum eru í sjúkrahúsverkinum. Ávarast skal ímóti at nýta álitið í verandi líki. Her eru stórar andsøgnir í, sum krevja neyva viðgerð. Tann politiski málsetningurin í álitinum umfatar eitt sjúkrahúsverk, har málið er dygdargóð og skjót viðgerð. Sjúkrahúsverk uttan røktaraspektið er órealistiskt og óseriøst. Undrist yvir um tað politiskt ikki eru krøv og ynskir um dygdargóða sjúkrarøkt, tí uttan hesa er eingin viðgerð. Ella er hetta kanska útrykk fyri politiskari óvitan?

**Dygdin í hásæti**

Í øllum álitinum verður tosað um dygd. Høgan yrkiligan standard, heild í sjúklingagongdini, minst møguligur váði fyri sjúklingin, høgt sjúklinganøgdsemi v.m. Hvat meinast tað við, tá tosað verður um høgan yrkisligan standard? Tað má umfata so dugnaligt og vælútbúgvi fólk sum gjørligt, so dygdin kemur sjúklinginum til góðar. Tað verður skrivað, at starvsfólkini veita ta tænastu og tí viðgerð, ið livir upp til altjóða fakligu krøv um høga dygd. Hetta eru beinleiðis argumentir fyri, at besta dygdin fæst við so væl útbúnum starvsfólki sum gjørligt. Fyri sjúkrarøkt er hetta sjúkraróktarfrøðingar. Um aðrir fakbólkar, ið hava lægri útbúgving, skulu útinna sjúkrarøkt, so krevur hetta bert uppaftur betri normering. Eitt starvsfólk við aðrari útbúgvin, kann aldrin virka ístaðin fyri ein sjúkraróktarfrøðing, tí aðrir røktarbólkar hava náttúrligar fakligar avmarkingar í førleikanum, og tørvurin á sjúkraróktarfrøðingunum er altíð tilstaðar. T.v.s at fleiri røktarstarvsfólk skulu virka fyri hvønn sjúkraróktarfrøðing. Lítil og eingin munur er á lønini, so grundgevingarnar halta fyri at flyta fakmørkini.

**Fakmørk flytast**

Tá sjúklinganøgdsemi verður lýst, so eru avgerðandi faktorar skrivlig og munnlig kunning, kontaktpersónar, innleggingar og útskrivingarsamrøður, heilsufremjandi og sjúkufyrbyrgjandi tiltøk v. m. Alt hetta eru kjarnuøkir innan sjúkrarøkt, og fer hetta at seta bæði kvalitativ og kvantitativ krøv til sjúkrarøktina og sjúkraróktarfrøðingar.

Tá tilhoyrandi tilmælið ljóða at "Fakmørkini skulu flytast uppeftir", og lægri útbúgvin røktarfólk skulu yvirtaka ávísar uppgávur, so slepst ikki undan, at hetta er í andsøgn við ta dygd, sum tilmælt verður allan vegin gjøgnum. Minst til, tey søgdu dygd = høgur yrkisligur standardur. Tað er sera ólogiskt, at tað ikki verður tilmælt, at útbúgva fleiri sjúkraróktarfrøðingar og taka fleiri flokkar inn um ár, í staðin fyri at "flyta fakmørk uppeftir". Her fær sjúkrarøktin ein viðgerðandi leiklut og aðrir fakbólkar mugu útinna sjúkrarøkt. Tað verður eisini nevnt, at sjuklingasamansetingin, broytist til eldri, røktartyngri og sjúkari sjúklingar, sum so aftur setur fleiri og økt krøv til sjúkrarøkt.

Eisini verður tilmælt, at taka fleiri sergreinir heim, sum síðan setur somu krøv til sjúkrarøkt.

Tað verður eisini tikið fram, um tann tilvitaða sjúklingin, sum bæði hevur høga vitan og setir hægri krøv til heilsuverkið, talar eisini fyri, at so væl útbúgvin fólk sum gjørligt eru neyðug fyri at veita hansara tørv. Nevnt verður, at sjúklingar við kroniskum sjúkum, hava tørv á heilsufremjandi og fyribyrgjandi tiltøkum. Hetta er sjúkrarøkt.

So alt í alt, eru gjøgnumgangandi í øllum álitinum, grundgevingar fyri, hvat dygd merkir, og týdningin av væl útbúnum starvsfólki. Tað sýnist sera løgið, at tað ikki verður tilmælt at útbúgva fleiri sjúkraróktarfrøðingar. Dygdarkrøv, høgur fakligur standardur, og sjúklinganøgdsemi vísa á grundgevingar fyri tørvin á væl kvalificeraðum sjúkraróktarfrøðingum.

**3 streingjað leiðsla**

Tá Hans Pauli Strøm vil endurskoða leiðslubygnaðin við 3 streingjaðari leiðslu, so skal hann minnast á, at Felagið Føroyskir Sjúkraróktarfrøðingar fóru í verkfall fyri at fáa sjúkrarøktina umboðaða í leiðsluni. Tá sjúkrarøktin er við sviðusoð í dag, so verður støðan bert verri, um sjúkrarøktin onga røðd hevur í leiðsluni. Okkara fakligu grundgevingar og sjónarmið mugu hoyrast á ovastu rók, annars versna umstøðurnar innan sjúkrarøktina munandi, og sjúklingurin verður ikki tryggjaður dygdargóða sjúkrarøkt. Avleiðingarnar eru longri innlegging, fleiri komplikatiónir og hægri deyðiligheit. Og til orðaval, ið politikkarir skilja – tað kostar nógv, ikki bert í menniskjalagnum, men eisini í krónum og oyrum.

Ynskiligt hevði verið, at landsstýrismaðurin í almanna og heilsumálum, hevði eitt fleirtáttað sjónarmið um viðurskiftini á heilsuverkinum.